LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 25. november 2024
J.Nr.: LUM-16- 24/09110-55
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Samandráttur av skrivi um kunngerð um tíðaravmarkaða serskipan fyri veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2023**

Í mars 2024 fekk umboðsmaðurin eina klagu um at eitt partafelag sum rættindahavi og bátaeigari og báturin hjá felagnum, flokkaður í bólki 5, samsvarandi § 18 í lógini um sjófeingi, vórðu noktað atgongd til fiskiskap á Føroyabanka í 2023.

Sjálv noktandi avgerðin hjá Vørn um fiskiloyvið varð ikki kærd til Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, og fyrisitingarligur kærumøguleiki sostatt ikki royndur. Umboðsmaðurin viðgjørdi tí ikki sjálva noktandi avgerðina um fiskiloyvið frá Vørn.

Klagarin hevði kært til Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið um § 5 í kunngerð nr. 73 frá 1. juni 2023 um tíðaravmarkaða serskipan fyri veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2023, sum varð hildin at vera ósaklig, órímilig og diskriminerandi fyri klagaran. Eisini vísti klagarin á, at ráðið hevði skeiva tulking av § 22, stk. 1 og stk. 2 í Sjófeingislógini, sum kunngerðin um tíðaravmarkaða serskipan fyri Føroyabanka í 2023 millum annað hevði sum heimild.

Í klaguni vórðu eisini onnur viðurskifti nevnd, sum umboðsmaðurin ikki viðgjørdi í skrivinum.

Málið hjá umboðsmanninum snúði seg tí um heimild og innihald av kunngerð nr. 73 frá 1. juni 2023 um tíðaravmarkaða serskipan fyri veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2023. Nevnda kunngerð var tíðaravmarkað og farin úr gildið, men líknandi kunngerð fyri 2024 var lýst.

<u>Heimildin fyri kunngerðina at skipa fiskiskapin á Føroyabanka</u>
Kapittul 5 í Sjófeingislógini hevur yvirskriftina "Skipan í fiskiskapinum hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi í føroyskum sjógvi".

Kapittul 5 byrjar í §§ 18 og 19 við fiskidagaskipanini fyri fiskifør undir føroyskum flaggi í botnfiskaveiðu í føroyskum sjógvi, tó Føroyabanki undantikin. Síðani verða mørkini fyri innaru og ytru fiskidagaleið viðgjørd í § 20, og í § 21 eru reglur um fiskiorku og kunngerðarheimild fyri landsstýrismannin.

Aftaná hesar reglur stendur § 22 við yvirskriftini "Aðrar skipanir í fiskiskapi í føroyskum sjógvi".

§ 22, stk. 1 er soljóðandi:

> "Fyri fiskiskap í føroyskum sjógvi, undantikin fiskiskapur skipaður sambært § 18, samanber tó stk. 4, kann landsstýrismaðurin áseta kvotuskipan, fiskidagaskipan ella aðra

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

> skipan og nærri reglur um atgongd, býti av tøkum fiskimøguleikum millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør og veiðihættir, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram.“

Viðmerkingarnar til upprunaligu § 22, stk. 1 vóru hesar:

> “Her er ásett, at landsstýrismaðurin kann gera nærri reglur fyri fiskiskapi, ið er eftir fiskasløgum og djórasløgum, ið ikki eru fevnd av fiskidagaskipanini, ella sum vanliga ikki eru høvuðsfiskasløg hjá teimum skipum og bátum, ið fiska undir fiskidagaskipanini –toskur, hýsa og upsi. Her kann vera talan um fiskiskap eftir øðrum botnfiski, uppsjóvarfiski ella øðrum djórasløgum, so sum skeljar, hummari, krabbi o.a. Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild at áseta heildarkvotu, reglur um atgongd, býti av heildarkvotum millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør, veiðihættir, og hvussu fiskiskapurin annars skal fara fram. Harumframt kann talan vera um reglur, sum avmarka talið av fiskiloyvum og reglur um loyvdar fiskileiðir, reiðskap og hjáveiðireglur. Talan er í høvuðsheitum um somu heimildir, ið landsstýrismaðurin hevur í verandi sjófeingislóg.”

Eg gevi mær far um, at § 22, stk. 1 vísir til stk. 4, sum ikki finst longur. Tilvísingin átti av røttum, sambært lógarbroytingini, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021, at víst til stk. 3, sum er ein heimild fyri landsstýrismannin at skipa fiskiskap við opnum, føroyskt bygdum, bátum undir 15 tons í bólki fyri seg uttan fyri fiskidagaskipanina, sambært § 18, stk. 1, nr. 5.

Í § 22, stk. 2 stendur síðani ein serlig heimild til landsstýrismannin at áseta nærri reglur um at skipa fiskiskapin eftir botnfiski og øðrum djórasløgum á Føroyabanka og um, hvørjir bólkar av fiskiførum ella veiðihættir kunnu gerast partar av skipanini.

Kunngerð nr. 73 frá 1. juni 2023 um tíðaravmarkaða serskipan fyri veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2023 vísti sum heimild til kunngerðina millum annað bæði til § 22, stk. 1 og 22, stk. 2 í Sjófeingislógini. Kunngerðin fyri tíðaravmarkaða serskipan fyri Føroyabanka í 2024 hevur eisini tilvísing til millum annað báðar hesar ásetingar.

Soleiðis sum lógin er uppbygd, eri eg ikki samd við ráðnum í, at § 22, stk. 1 eisini fevnir um at áseta fiskidagaskipan fyri Føroyabanka. Tá ið Løgtingið ítøkiliga á henda hátt hevur gjørt eina serliga áseting fyri Føroyabanka í stk. 2, vil vanlig løgfrøðilig fatan, sambært lex specialis, vera, at stk. 1 ikki fevnir um Føroyabanka.

Ráðið hevur ført fram, at tilsipingin til § 22, stk. 1 sum heimild ikki ger nakran mun fyri kunngerðina, av tí at heimild í øllum førum er í § 22, stk. 2. Hetta havi eg sum so ikki viðmerkingar til, men eg haldi tó, at tað er ikki rætt at vísa til § 22, stk. 1 sum heimild fyri kunngerðini, tá ið ásetingin ikki viðvíkur Føroyabanka. Eg fari at mæla ráðnum til at umhugsa at strika § 22, stk. 1 sum heimild í Føroyabanka kunngerðini.

<u>Hugtakið “rætt til fiskiloyvi” í kunngerðini</u>

Í §§ 3-5 í kunngerðini var ásett, at fiskifør, sum í 2023 høvdu rætt til fiskiloyvi í ávísum bólki, sambært § 18 í løgtingslógini, kundu royna við ávísum reiðskapi á Føroyabanka í ávíst dagatal í 2023.

Klagarin hevur víst á, at kunngerðin var skeivt orðað, av tí at fiskifør ikki hava rætt til fiskiloyvi, sambært § 18, stk. 1, nr. 2 í løgtingslógini. Reglur um rætt til fiskiloyvi eru í § 6 í løgtingslógini, og fiskirættindi liggja altíð hjá persónum og feløgum, óheft av fiskiførum ella einstøkum fiskifari.

Í løgtingslógini § 2, stk.1, nr. 6 er orðið fiskiloyvi allýst sum tann rættur, sum eigari av ávísum fiskifari fær at veiða av ávísum livandi sjófeingi á ávísum leiðum í einum fiskiári. Í samsvar við hetta er ásett í § 6 í løgtingslógini, at fiskiloyvi verður latið eigara av fiskifari til egið fiskifar við veiðiloyvi treytað av, at fiskifarið lýkur treytirnar í § 5, stk. 1, nr. 3-5.

Vísandi til allýsingina í § 2, nr. 6, undrist eg á, at kunngerðin í §§ 3-5 vísti til fiskifør, sum høvdu rætt til fiskiloyvi, tá ið fiskiloyvi, sambært løgtingslógini, verða latin eigara av ávísum fiskifari.

Eg gevi mær tó far um, at § 18 í løgtingslógini hevur kunngerðarheimild til landsstýrismannin, at áseta fiskidagatal fyri hvørt fiskiár fyri ávísu bólkarnar, sum verða nevndir. Hóast hugtakið fiskiloyvi sostatt ikki beinleiðis er nevnt í § 18, so ásetur § 18, stk. 2, at rætturin til fiskidagar, sambært stk. 1, nr. 1-5, verður latin teimum, sum í 2019 høvdu henda rætt, ella teimum, sum hesin rættur seinni er fluttur til. § 18 hevur sostatt umrøðu av rætti til fiskidagar. Eg haldi tó, at ásetingin í kunngerðini um fiskifør, sum hava rætt til fiskiloyvi, er ikki røtt og ikki í samsvar við allýsingarnar av hugtakinum "fiskiloyvi" í Sjófeingislógini. Hetta skapar óneyðugan ógreidleika um treytirnar fyri útlutan eins og vanda fyri, at útlutanin ikki verður í samsvar við reglurnar í Sjófeingislógini um fiskiloyvi.

<u>Skal býtið á landgrunninum síggjast aftur á Føroyabanka?</u>
Klagarin hevur ført fram, at bólkabýtið - tal av fiskidøgum - á landgrunninum, sum meginregla, skal síggjast aftur í bólkabýtinum á Føroyabanka.
Ráðið hevur hinvegin ikki ta áskoðan, at býtið á Føroyabanka, sambært heimildargrundarlagnum, skal vera tað sama sum á landgrunninum. Ráðið hevur greitt soleiðis frá:

> "Tá fiskidagaskipanin á landgrunninum bleiv innførd í 1996, kom eisini heimild í lógina til landsstýrismannin at áseta fiskidagaskipan fyri Føroyabanka. Vísast skal til § 29, stk. 2 og § 9, stk. 1, nr. 3 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap (LVF). Sambært § 29, stk. 2 í LVF kundi fiskidagaskipan ásetast eftir somu skipan, sum fyri landgrunnin. Ivasamt er, hvat hetta merkti. Onki bendir tó á, at § 29, stk. 2 neyðturviliga skuldi skiljast soleiðis, at býtið á Føroyabanka skuldi vera eins og á landgrunninum, og tað er sum nevnt heldur ikki umsitið soleiðis. Talan var bert um eina heimild at kunna áseta eina fiskidagaskipan fyri fiskiskapin á Føroyabanka. Tað er heldur onki í lógargrundarlagnum ella umsitingini av økinum síðani, sum gevur grundarlag fyri, at býtið skal vera tað sama á Føroyabanka sum á landgrunninum."

Eftir at hava lisið Sjófeingislógina og viðmerkingarnar og vísandi til vanliga málsliga fatan av yvirskriftini fyri § 22, snýr § 22 seg um aðrar skipanir enn § 18. Hóast eg í ávísan mun skilji fatanina hjá klagaranum viðvíkjandi søguligu gongdini og meginreglum fyri bólkabýtið, haldi eg, at tað ikki við neyðugum greidleika framgongur av galdandi lóg, at landsstýrismaðurin í sambandi við áseting av nærri reglum um at skipa fiskiskapin eftir botnfiski og øðrum djórasløgum á Føroyabanka, sambært § 22, stk. 2, er bundin av bólkabýtinum á landgrunninum.

**Samanumtikið**
Eg haldi samanumtikið, at kunngerðin um tíðaravmarkaða serskipan fyri veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2023 ikki hevði ynskiliga lóggávudygd, við tað at víst varð til § 22, stk. 1 sum heimild, eins og kunngerðin nýtti hugtakið fiskiloyvi á annan hátt enn allýst í løgtingslógini. Tá talan er um eitt so stórt og týdningarmikið lógarøki, eigur, eftir míni meting, at verða løgd nógv áherðsla á at nýta gjøgnumført orðaval fyri at skapa greidleika. Um kunngerðir sum henda ikki

nýta somu allýsingar og hugtøk sum Sjófeingislógin, er vandi fyri, at umsitingin eftir kunngerðini ikki verður í samsvar við lógina.

Eg fari tí at mæla ráðnum til at:

- Umhugsa at strika § 22, stk. 1 sum heimild í Føroyabanka kunngerðini
- Vissa sær, at kunngerðir við heimild í Sjófeingislógini taka støði í teimum allýsingum og meginreglum fyri fiskiloyvi og veiðiloyvi, sum Sjófeingislógin ásetur.

Burtursæð frá viðmerkingum mínum omanfyri geri eg ikki meira við málið.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður